UTTAN ÚR HEIMI

## Røkke í penganeyð

Fyri nøkrum mánaðum síðani metti norska blaðið Aftenposten, at fyritøkan Aker RGI hjá ríkmanninum Kjell Inge Røkke hevði tørv á nógvum nýggjum kapitali, og nú vísa skjøl, sum blaðið hevur fingið fatur á, at metingin var røtt.

Ein frágreiðing, sum nevndin í Aker RGI hevur gjørt um fíggjarstøðuna hjá felagnum, vísir, at felagið hevur lænt 4,9 milliardir krónur síðani seinasta heyst, og av hesum eru 4,1 milliardir krónur læntar teir seinastu mánaðarnar. Í nevndarfrágreiðingini stendur, at skuldin hjá felagnum er nú so stór, at neyðug tiltøk mugu setast í verk.

Kjell Inge Røkke eigur 49 prosent av partapeninginum í felagnum Aker Kværner. Partur hansara er bókaður til 3,5 milliardir krónur, men á virðisbrævamarknaðinum í Oslo eru øll partabrøvini í felagnum 4,3 milliardir krónur verd. Aftenposten skrivar, at ríkmaðurin hevur mist fleiri milliardir krónur seinastu árini, og at hann hevur roynt at selja sítt privatflogfar, marglætisbátin og eina marglætisíbúð í í London fyri at útvega nýggjan kapital.

## Ov dýrt at ferðast í Grønlandi

Í grønlendsku ferðavinnuni eru fólk ill inn á fólkatingsmannin Kubik Kleist, tí hann í einum donskum blaði hevur kært seg um, at tað er alt ov dýrt at ferðast í Grønlandi.

Men ferðavinnufólkini ásanna samstundis, at tingmaðurin hevur rætt. Stig Rømer Winther í Greenland Tourism sigur við grønlendska útvarpið, at tey vildu fegin, at flogferðaseðlarnir á innanlandsrutunum vóru bíligari, men at tað er eitt politiskt mál. Hinvegin ásannar hann, at tað er dýrt at reka flogferðslu í Grønlandi. Tann bíligasti ferðaseðilin við flogfari úr Nuuk til Kangerlussuaq kostar 1.820 krónur.

Stig Rømer Winther heldur tað kortini vera óheppið, at tingmaðurin hevur úttalað seg í Danmark um ferðaprísir í Grønlandi, tí tað kann fáa fólk í Danmark at halda, at tað er eisini dýrt at flúgva til Grønlands. Men tað er tað ikki, sigur hann.

## Reiðarí fekk bót

Almenna dansk-týska ferjureiðaríið Scandlines skal gjalda 1,7 millión krónur í bót, tí felagið breyt kappingarlógina, tá tað kroysti eitt annað reiðarí, Easy Line, til at gevast við ferjusiglingini millum Danmark og Týskland.

Undir kanningunum hava myndugleikarnir avdúkað, at Scandlines gjørdi serligar príssáttmálar við bussfeløg, men treytin fyri lagaligum prísum var, at busseigararnir ikki máttu nýttu ferjurnar hjá Easy Line. Úrslitið varð, at Easy Line fór á heysin. Nú Scandlines fær bót, hava gomlu eigararnir í Easy Line boðað frá, at teir umhugsa at krevja endurgjald frá almenna ferjureiðarínum.

Scandlines er nú einsamalt um siglingina úr Gedser og Rødby til Týsklands.

# Hann skal biðja um umbering

**Viðurskiftini millum Týskland og Italia eru á frostmarkinum, eftir at italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, helt ein týskan lim í Evropatinginum ver egnaðan í einum leikluti sum vaktarmaður í einari nazistiskari týningarlegu**

ORÐALAG
*Árni Joensen*

Í Berlin hevur Gerhard Schrøder, kanslari, gjørt greitt, at hann vil hava eina formliga umbering frá Berlusconi. Hvørki meiri ella minni. Berlusconi hevur seinni sagt, at orð hansara vóru ætlað sum skemt, og at hann fer ikki at biðja týska tinglimin Martin Schulz um umbering. Men tað krevur Schrøder. Hann metir málið so álvarssamt, at hann boðsendi italska sendiharranum í Berlin til fundar mikudagin. Tað hevði við sær, at týski sendiharrin í Rom fekk boð um at koma á fund í uttanríkisráðnum har.

Í gjár kravdi ES-tingið eisini, at Berlusconi skal koma við einari formligari umbering. Ger hann ikki tað, er ES-tingið til reiðar at slíta alt samstarv við ES-ráðið, har ríkis- og stjórnarleiðararnir í limalondunum sita.

Italia tók við formansskapinum í ES 1. juli, og frammanundan vóru tað mong, sum stúrdu fyri, at ES fór at koma í trupulleikar av Berlusconi, sum í heimlandinum er skuldsettur fyri bæði mutur og svik. Hann hevur tó fingið tjóðartingið at samtykkja eina lóg, sum ger, at hann kann ikki dragast fyri rættin, so leingi hann er forsætisráðharri.



*Silvio Berlusconi. Sum væntað hevur hann longu elvt til trupulleikar í ES*

*Mynd: Reuters*

### Tað segði Berlusconi við Martin Schulz:

*»Eg veit, at fólk í Italia eru í ferð við at gera ein film um nazistisku týningarlegurnar. Eg vil fegin virka fyri, at tygum kunnu fáa ein leiklut sum kapo. Tygum høvdu egnað tygum væl til tess«.*

Orðið "kapo" varð undir seinna heimsbardaga nýtt um brotsmenn og stundum jødar, sum leiðslurnar í nazistisku týningarlegunum settu til at ansa eftir hinum fangunum. Orðið verður eisini nýtt um landasvíkjarar.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá ið kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Andreas á Marknagili**
**Klaksvík**

andaðist og fór til gravar.

Tøkk til tykkum, sum lótu peningagávu til »Malta«.

**Heini, Marita, Nina og John Júst við familju**

# Ísrael snýtt palestinar?

**Samstundis sum heimsins fjølmiðlar vístu myndir av ísraelskum stríðsvognum, sum tóku seg aftur úr Betlehem, kom fram, at ísraelsku myndugleikarnir hava lagt hald á palestinsk øki á Vestara Áarbakka beint ímóti friðaravtaluni**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Palestinararnir í bygdunum Beit Eksa og Beit Souriq norðan fyri Jerusalem gjørdust ikki sørt skakkir mikudagin, tá ísraelskir hermenn og embætismenn fóru at seta upp skelti, sum søgdu frá, at jørðin á staðnum var almenn ogn, og at øll atgongd var bannað. Samstundis fingu palestinsku bygdafólkini at vita, at hús teirra verða tikin niður.

Palestinsku leiðararnir í økinum siga, at talan er um ognartøku, og at tiltakið er sett í verk fyri at flyta burtur teir palestinararnar, sum búgva ímillum tær jødisku niðursetubygdirnar. Palestinski ráðharrin Yasir Abed Rabbo legði ísraelsku myndugleikarnar undir beinleiðis rán.

- Friðarætlanin sigur greitt, at ísraelsmenn skulu gevast við at leggja hald á palestinskt lendi og at ríva palestinsk hús niður. Hetta seinasta ísraelska tiltakið vísir bert, hvussu trupul friðartilgongdin verður, segði Rabbo.

Ísraelski mannarættindafelagsskapurin B'Tsalem leggur stjórnina hjá Ariel Sharon undir at snýta palestinar og tey, sum hava gjørt seinasta friðaruppskotið við at ognartaka palestinskt lendi í loyndum.






Nú kanst tú eisini keypa V4-seðil við fartelefonini. Send eini SMS-boð við tekstinum, V4, til 1441. Tú fært beinanvegin eina kvittan við fýra V4 tølum sendandi.

Tú ert nú við í dráttinum bæði um vanligar vinningar og eykavinningar. Drigið verður hvørt leygarkvøld kl 19.00 í Útvarpi Føroya. Er tað ein fartelefon, ið hevur vinnaraseðilin, fær vinnarin SMS-boð um, at hann hevur vunnið. Vinningin eigur tann, ið stendur fyri fartelefonini.

V4-seðlar kunnu verða keyptir við fartelefon til kl. 17.00 leygardag. Sølan til næsta drátt byrjar longu kl. 20.00 sama leygarkvøld.

Kostnaðurin fyri hvønn V4-seðil, sum er keyptur við fartelefon, er 27,50. Gjaldið kemur á telefonrokningina ella verður tikið av talutíðar-kortinum.

Hvør fartelefon kann í mesta lagi spæla við trimum seðlum í hvørjum drátti. Verður roynt at keypa 4. seðilin, fært tú SMS-boð um, at hetta ikki ber til.
Fyribils kunnu bert fartelefonir frá Føroya Tele brúkast at spæla V4 við.

Spælir tú við fleiri seðlum gjøgnum fartelefonina, er lætt at fylgja við. Send eini SMS-boð við tekstinum, V4 S, til 1441. So sært tú tínar seðlar á fartelefonini.

**Eykavinningurin í juli:**
**150.000 kr.**

Allar upplýsingar um V4-dráttin síggjast annars eisini á www.uf.fo.




Vinn við
tað er so nógv lættari